


www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 11 - 2012

# Statoil hóttir við at rýma úr Noregi

Tað kann ljóða eitt sindur av einari andsøgn, at eitt alment felag skal hótta við at rýma undan almennum skattareglum, men leiðslan í norska oljufelagnum Statoil so misnøgd við nakrar nýggjar skattareglur, at hon hóttir við at flyta virksemið hjá felagnum úr Noregi. Tær nýggju skattareglurnar umfata tað útlendska virksemið hjá norskum feløgum, og hjá Statoil er talan um ein skattabrest í milliardastødd, skrivar Dagens Næringsliv. Blaðið vísir á, at í frágreiðingini, sum Statoil kunngjørdi í sambandi við roknskapin fyri 3. ársfjórðing, stóð, at tær nýggju skattareglurnar kunnu fara at kosta felagnum 2,3 milliardir krónur. Sambært Dagens Næringsliv er hetta talið nógv størri enn tað, sum hevur verið frammi fyrr, og tað hevur eisini elvt til so stóra misnøgd í Statoil, at leiðslan hóttir við at flyta arbeiðspláss av landinum. -Ein náttúrlig avleiðing av broytingunum er, at Statoil er farið undir at hyggja at møguligum broytingum í bygnaðinum fyri at tryggja altjóða kappingarførið hjá felagnum, sigur skattastjórin hjá Statoil, Finn Lexow, við blaðið.